## Meldaði børn fyri kavabløk

Ein kona í Sørvági meldaði í gjárkvøldið nøkur børn í bygdini. Børnini kastaðu kavabløk á húsini, og hetta østi konuna so mikið, at hon meldaði hetta til løgregluna. – Politiið kom á staðið, men tá vóru børnini burtur. Tey eru altíð skjótari enn vit, tá tað er okkurt tílíkt, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn. Hann greiðir somuleiðis frá, at sum oftast verður onki gjørt við tílík mál, men eru teir úti, so koyra teir ein túr. Tað kemur tó ofta fyri, at børn verða meldaði fyri tílíkt. – Tað eru nøkur, sum eru eitt sindur smásár, og melda tílíkt. Tað er eisini har, børnini gera mest fortreð, staðfestir vakthavandi.



## Lótu skutara úr

Um sjeytíðina í gjárkvøldið meldaði eigarin av einum skutara, at alt var stolið av honum. Bara sjálvt stellið stóð eftir. – Helst eru tað ungfólk, sum hava ribba skutaran, men hetta er ikki eitt mál vit gera so nógv við, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn. Hann vísir tó á, at hesi mál vera loyst oftari enn fólk flest halda. – Ofta eru tað teir somu, sum gera tílíkt í eina tíð. Tá vit so finna fram til viðkomandi, sum seldur lutir ella okkurt tílíkt, so loysa vit ofta eina rúgvu av málum, sigur vakthavandi. Tað er eisini soleiðis, at fingramerkir ofta eru, tá tílíkt verður gjørt, og hesi kunnu ofta nýtast at loysa mál, tá tað eru fólk, sum politiið kennir, sum gera stuldurin.

# Æviga ringrásin á bók

**Listamaðurin Oggi Lamhauge er í holt við øðrvísi verkætlan. Hann hevur flutt seg inn á økið, sum annars ikki verður dyrkað í Føroyum, nevniliga installatiónslist. Hann hevur gjøgnum eitt ár sýnt fram installatiónir við tilfari úr náttúruni, ið ímynda ævigu ringrásina**



*Oggi Lamhauge leggur seinastu hond á verkætlanina Ringrás. Í eitt ár hevur0 hann gjørt installatiónir við tilfari úr náttúruni, avmyndað tær og arbeiðir í løtuni við at savna tær í bók*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

LIST
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Oggi Lamhauge, ið dagliga starvast í Listasavni Føroya, hevur í eitt ár sýnt fram listarligar installatiónir í hølunum hjá Kunningarstovuni í Havn. Hann hevur við installatiónunum tikið náttúruna inn í framsýningarhølið, við at nýta tilfar sum tara, sand, eplir, bløð og annað, ið er at finna í náttúruni.

- Her er talan um eitt slag av umhvørvislist. Tað er at líknað við stílin Land art, ið var sera væl umtóktur í USA seinast í 1960 árunum og fyrst í 1970 árunum. Fyri meg persónliga er tað ein undran yvir tað, sum er skapt, niðurbrýtist og endurskapar seg, sigur Oggi Lamhauge um sína verkætlan.

Installatiónslistin verður annars ikki dyrkað í Føroyum, ikki á sama hátt sum landslagið verður dyrkað av myndlistafólki. Í okkara grannalondum er meir teknisk breidd at síggja, heldur Oggi Lamhauge. Hann greiðir frá, at til árligu framsýningarnar, har øll hava møguleika at senda inn tilfar, er sjáldsamt at síggja installatiónir. Eitt nú er sjáldsamt við videoverkum, hóast fleiri listafólk fáast við video og list. Í staðin eru ofta millumting millum standmynd og installatión at finna í framsýningunum.

### Æviga ringrásin

Oggi Lamhauge hevur kortini gjørt eina roynd við installatiónum. Tað var í samband við framsýningina Natúrligvís, ið varð sett upp í Norðurlandahúsinum, at Oggi Lamhauge avgjørdi at seta hol á egna framsýning. Við á Natúrligvís framsýningini, hevði Oggi Lamhauge ein ring úr torvi, sum við Natúrligvís ferðaðist runt í verðini. Við Ringrás verkætlanini hevur hann gjørt tað øvugta, og í staðin tikið náttúrliga tilfarið úr náttúruni, og inn í eitt høli við skiftandi installatiónum.

- Eg eri ikki vistfrøðiliga drivin ella nakað. Men náttúran hugtekur meg. Hendan æviga ringrásin í náttúruni og í lívinum, sigur Oggi Lamhauge.

Heldur ikki er hann á nakran hátt buddhistiskur í síni tilgongd til sína list, men í staðin fer hann inn í listina við síni kristnu bakgrund.

- Hetta er mín undran yvir skaparaverkið, tað, sum vit síggja. Hendan æviga ringrásin, sum er ein livandi og ein doyggjandi partur av árinum, og samstundis okkara lívi.

Ringrás ímyndar eitt ár, ein ring. Hugskotið er, at tilfarið í framsýningini forgongur ella fer aftur til náttúruna. Samanumtikið er Oggi Lamhauge væl nøgdur við verkætlanina. Hetta hevur verið ein eksperimenterandi verkætlan, sum hann so hvørt hevur uppfunnið. Tað einasta, ið var fastlagt frammanundan, var tíð og rúm, ið vóru karmar um framsýningina.

Einasta dokumentatión er myndatøkan av hvørjari installatión, og tær myndirnar skulu nýtast til bókina, sum skuldi verið útkomin. Saman við teksti, ið hóskar til hvørja árstíð, skal bók gevast út um installatiónina. Tey, ið hava fingið til uppgávu at skriva tekst og yrkingar til bókina, eru Rakel Helmsdal, Oddfríður Marni Rasmussen, Sigri Gaini og Petur Pólsson, og verður bókin væntandi á gøtuni skjótast gjørligt.

# Nýggjjárskonsertin í vanda

**Nýggjjárskonsertin hjá Symfoniorkestrinum, sum Kringvarp Føroya hevur varpað út seinastu 10 árini, er í vanda. Framleiðslan er kostnaðarmikil, og tí skal nýggj avtala fáast í lag**

MENTAN
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Tað er í løtuni óvist við Nýggjárskonsertini hjá Føroya Symfoniorkestri, sum øll árini hevur verið send beinleiðis um útvarpið og sjónvarpið hjá Kringvarpinum. Føroya Symfoniorkestur hevur fingið at vita, at partarnir mugu samráðast um nýggja avtalu, tí tað er vorðið ov dýrt hjá Kringvarpinum at senda Nýggjárskonsertina.

Annika Miðtún Jacobsen, stjóri í Kringvarpinum, váttar at Symfoniorkestur Føroya kennir sviðan av sparingum, sum raka Kringvarpið í løtuni. Stóri trupulleikin hjá Kringvarpinum, er at játtanin ikki er vaksin seinastu fimm árini, samstundis sum pensiónir og lønir á hvørjum ári hækka. Tí mugu avtalurnar hjá Kringvarpinum endurskoðast, og ein av hesum er avtalan við Føroya Symfoniorkestur.

- Tað er vorðið siðvenja, at Kringvarpið tey seinastu 10 árini hevur sent Nýggjárskonsertina hjá Føroya Symfoniorkestri beinleiðis. Men tað er ein dýr framleiðsla, bæði viðvíkjandi uppseting og sendiútreiðslum. Vit vilja fegin senda konsertina til Føroya fólk. Men eingin skrivligur sáttmáli hevur verið um at senda konsertina, og tí ætla vit at gera ein formligan sáttmála við Føroya Symfoniorkestur, sigur stjórin fyri Kringvarp Føroya.

Annika Miðtún Jacobsen sigur, at tilfar sum Nýggjárskonsertin, er gott tilfar at senda, men at hon samstundis er ov kostnaðarmikil, og at tað serliga er sjónvarpsframleiðslan, ið kostar Kringvarpinum. Tað kostar Kringvarpinum 50.000 krónur at taka upp og senda Nýggjárskonsertina, umframt 50.000 krónur í rættindum.

Sum skilst, fara partarnir at fundast um sáttmála í næstum.